

*- Eg haldi, at tað er fullkomiliga sjúkt av Fiskiveiðieftirlitinum og landsstýrismanninum í fiskivinnumálum at fara út í fjølmiðlarnar og siga, at vaktarskipini liggja, sigur Kári P. Højgaard*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Stór og vanærilig skomm

**SKOMM** Kári P. Højgaard heldur, at tað er ein stór og vanærilig skomm fyri Føroyar sum fiskivinnutjóð, at politiska skipanin ikki skal syrgja fyri, at olja er til hjálpar-og vaktarskipini, Tjaldrið og Brimil

Vilmund Jacobsen

Løgtingsmaður Sjálvstýrisfloksins, Kári P. Højgaard, sigur seg hava trupult við at skilja logikkin hjá summum løgtingsmonnum í ymiskum málum.

- Ein er Torbjørn Jacobsen, sum umboðar Tjóðveldi í fíggjarnevndini. Hann er heitasti talsmaður fyri, at Føroyar byggja nýtt havrannsóknarskip fyri einar 200 miljónir krónur, samstundis sum fíggjarnevndin ikki kann veita hjálpar-og vaktarskipunum, Tjaldrinum og Brimli, játtan, so tey kunnu røkja sínar eftirlitsuppgávur á havinum.

### Lítil logikkur

Kári sigur, at hann við hesum á ongan hátt vil leggja eftir løgtingsmanninum hjá Tjóðveldi, men hann sigur seg undra seg yvir logikkin.

- Eg haldi, at tað er ein stór og vanærilig skomm, at Føroyar sum fiskivinnutjóð ikki skulu kunna syrgja fyri, at hjálpar-og vaktarskipini hava olju, so tey kunnu fremja sínar eftirlitsuppgávur til lítar. Ja, eg havi ikki orð fyri, hvussu ússaligt, eg haldi hetta vera.

Løgtingsmaðurin heldur, at tá tað sansar at, og løgtingið veit, hvussu støðan er, átti fíggjarnevndin at verið viðspælari.

- Eg skilji slett ikki, at politiska skipanin kann góðtaka, at støðan er so vorðin, at Tjaldrið og Brimil nú koma at liggja meginpartin av tí, sum er eftir av hesum árinum – og helst eisini verða munandi skerd í komandi ári, sigur Kári P. Højgaard.

> **... eg skilji slett ikki, at politiska skipanin kann góðtaka, at støðan er so vorðin...**
> KÁRI P. HØJGAARD

### Tað er sjúkt

Tað, sum ikki minst undrar løgtingsmannin í hesum máli, er, at bæði Fiskiveiðieftirlitið og landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard, alment viðganga – og næstan javnan boða frá – at nú er at kalla einki eftirlit á havleiðunum, tí skipini liggja vegna skerjingar.

- Eg haldi ikki, at slíkt er nakað, tú fert út í miðlarnar við, og eg haldi, at slíkt er fullkomiliga sjúkt, leggur løgtingsmaðurin, Kári P. Højgaard, aftrat.

vilmund@sosialurin.fo